# Alt pappír á einum penni




**Luttakararnir á veðurlagsráðstevnuni TACC fáa allar upplýsingar frá fyrilestrunum á einum smørtum penni, sum í veruleikanum er ein geymi**

Ein og hvør, sum hevur verið á ráðstevnu veit, at rúgvan av pappíri, sum skal heim aftur við, lættliga fyllir alla teldutaskuna og kanska kuffertið við. Men á TACC ráðstevnuni fáa luttakararnir ongi pappír. Harafturímóti hava fyrireikararnir gjørt øllum luttakarunum hvør sín pen, sum samstundis er ein geymi. Á geymanum liggja allir neyðugir upplýsingar, so sum power-point framløgur, faktuellir upplýsingar og myndir.

# Frísk frukt og fitness til Gore

**Brúðarsvitan á Hotel Føroyum stendur klár við fRískum freistingum til fyrrverandi varaforsetan**

Um fáar tímar lendir flogfarið við Al Gore vesturi í Vágum, og allar fyrireikingar eru um at vera komnar undir land. Uppi á Hotell Føroyum er songin í brúðarsvituni uppreidd, og serligu ynskini frá Al Gore uppfylt.

Tí fyrrverandi amerikanski varaforsetin hevur sjálvandi, sum ein verulig stjørna, nøkur serlig ynski, nú hann vitjar kavakløddu klettarnar í norðuri. Og tað verður hvørki toskur ella Føroya Bjór sum kemur at freista kræsna góman. Hann hevur nevniliga ynskt útlendskar vørur, so sum fríska frukt, ost og reyðvín sett fram, umframt eina serliga venjingarmaskinu, ein sonevndan krosstrenara, frá Yndi Fitness.

Starvsliðið hjá Gore gistir eisini á hotellinum, og tað sama ger agenturin, sum er svii.

Al Gore hevur sjálvandi eisini sett ávísar treytir til bilin, sum hann skal koyra runt í. So tað verður ikki ein av hesum stóru dálkandi fýrahjulstrektu jeepunum, sum hjá Clinton. Harafturímóti stendur ein Lexus, sum ikki brennur ov nógv, klárur til umhvørvisprædikantin.



